## Brúdleyp

Leygardagin 25. juni *giftust* í Singapore Ivan í Lág, Strendur og Sharon Rose, Singapore. Veitslan verður í HB-húsinum 27. juli kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 314067 ella 448342 áðrenn 10. juli.

Í dag, 7. juli, kl. 14.30 giftast í Kollafjarðar kirkju Anja Zachariasen, Streymnes, og Dan Jacobsen, Kollafirði. Døgurið verður fyri innbodnum. Kl. 20.30 verður opið hús í Bygdarhúsinum í Hósvík. Øll eru vælkomin.

9. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Arina Bischoff og Høgni Hammershaimb Debes. Veitsla verður í HB-húsinum fyri innbodnum.

Leygardagin 9. juli kl. 13.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Karina Lassen og Gimmi Olsen. Eftir vígsluna og fram til kl. 18 eru øll hjartaliga vælkomin í KFUM & K at heilsa upp á brúðarparið.

Fríggjadagin tann 15. juli kl. 14.00 giftast í Sørvágs kirkju Tórfríð Davidsen, Sørvágur og Dánjal Tavsen, Sørvágur. Døgurði verður fyri innbodnum í Missiónshúsinum Libanon. Vælkomst verður í Sørvágs Bio kl. 20.00.

Leygardagin 16. juli kl. 10.00 giftast Rúna á Rógvi Simonsen, Vestmanna, og Jákup Olaf Thomassen, Sandavágur, í Sandavágs kirkju. Døgurði verður fyri innbodnum. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, eru vælkomin til nátturða og køkur í ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 19.00.

Leygardagin 16. juli kl. 12.00 giftast í Nebo á Toftum Bodil Rasmussen, Toftir ogt Levi á Torkilsheyggi, Nes. Døgurði verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík, kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá á tlf. 223511, 213512 ella 447111, 447404 innan 7. juli.

Fríggjadagin 22. juli kl. 17.00 giftast í Nólsoyar kirkju Anne Mette Greve Klemensen úr Rødding og Leif Hansen úr Nólsoy. Eftir vígsluna verður vælkomst á Alistøðini. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá innan 10. juli á 273165 ella 327061 ella á annemette@mpiri.org

Leygardagin 23. juli kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Anna Elisabeth Joensen av Tvøroyri og Sámal Jákup Gøte úr Leirvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at ringja og boða frá áðrenn 9. juli á tlf. 322308 ella 220020. Eisini ber til at skriva til Goete@kallnet.fo

Leygardagin tann 30. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Elin S. Joensen, Miðvágur, og Tór-Ingar Akselsen, Sandavágur. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í SÍF- húsinum í Sandavági frá kl. 20.30.

Leygardagin 30 juli. giftast í Betania í Skopun kl. 14.00. Davia Gertrud Nicolajsen, Skopun og Hans Jacob Reinert Petersen, Saltnes. Tey ið vilja gleðast saman við okkum, eru vælkomin inn á gólvið hjá Arndis og Jógvan Hendrik Nicolajsen, Skopun, frá kl. 19.00.

Leygardagin 30. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju, Winnie Tausen, Hov og Søren Poulsen, Nólsoy. Veitslan verður í Pálsstovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 317802 ella 222428 innan 10. juli.

Sunnudagin 31. juli kl. 15.00 giftast í Viðareiðis kirkju Julianna O.W. Høgensen úr Klaksvík og Jóhan Sjóstein av Viðareiði. Vælkomst verður í heiminum eftir kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 6. august kl. 13.00 giftast í Kaldbak Sólmei Eydna Rasmussen, Kaldbak og Finn Nolsøe, Kaldbak. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 311999 ella 316797.

Leygardagin 13. august kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni, Rannvá Lind Helgadóttir, Vestmanna og Borgar Hansen, Nes. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449988, 424511, 584430 ella 504040 innan 1. august.

## Silvurbrúdleyp

Týsdagin 26. juli, hava Ása og Kári Olsen silvurbrúdleyp. Tey, sum vilja gleða okkum við at koma til borðhaldið, sum verður hildið á Læraraskúlanum sama kvøldið, kunnu boða frá á tlf. 31 65 85 - 21 65 85 og 51 65 85.

Týsdagin 9. august kunnu hjúnini Eydna og Bartal Kass, Argir halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 13. august kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið eru vælkomin í neystið - har borðreitt verður við stóra kalda borðinum - og verða vinarliga biðin um at boðað frá á tlf. 31 64 56 ella á tlf. 22 13 10 innan 1. august.

## 120 ár

9. juli fylla Hjørdis og Hjørleif Hansen Tjørnuvík 80 og 40 ár Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum frá kl. 17.

## 80 ára føðingardagar

Í dag verður Elsa Maria Højgaard, Saltangará, 80 ár. Hon er burturstødd.

Mánadagin 11. juli verður Mervyn Dimon, Tvøroyri, 80 ár. Tey, ið vilja heilsa upp á hann, eru vælkomin í TB-húsið millum kl. 15.00 og 18.00. Kvøldið verður hildin saman við familjuni.

## 75 ára føðingardagar

Fríggjadagin 8. juli fyllir Jógvan I. Olsen á Toftum 75 ár.

Leygardagin 9. juli verður Sanna Johannesen, Skála, 75 ár. Dagurin verður hildin hjá soninum Hans Martin, Millum Gilja 32 í Hoyvík frá kl. 17.00. Øll eru vælkomin.

## Prógv

Gunvør Jacobsen, Tórshavn, hevur í Mótaskálanum P/F Skálabúðini lokið prógv innan handil (detail) við sergrein. Lærimeistari Marin Skála.

Hósdagin 23. juni hevur Marstein Thomsen, Syðrugøtu, lokið prógv sum námsfrøðingur við Esbjerg Seminarium.

# TILTØK

**Gudstænastur**
**7. sunnudag e. Trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00: Bergur D. Joensen. Altargongd
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00: Sonja Klein
***Nólsoy:*** kl. 12.00, Jóannis Fonsdal
***Hósvík:*** kl 11.00, altargongd - Inga Poulsen Dam
***Saksun:*** kl. 11.00, Marjun Bæk
***Hvalvík:*** kl. 12.00, Marjun Bæk
***Norðskála:*** kl. 11.00, Regin Høgnesen, trúboðari
***Eiði:*** kl. 10.40, skriftamál, kl. 11.00, Emil Olsen
***Skála:*** kl. 11.00, Jógvan Fríðriksson
***Oyndarfjørður:*** kl. 12.00, Jens Hvas
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, Niels Pauli Danielsen
Kl. 16.00 verður konsert í *Christianskirkjuni* v/ Consertus Universitetskór
***Klaksvíkar Sjúkrahús:*** kl. 10.00, Øssur Kjølbro
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Øssur Kjølbro
***Hvannasund:*** kl. 12.00, Elsa Funding

**Gudstænasta hóskvøldið 7. juli**
***Norðoya Vistarheim:*** Kl. 19.30, Niels Pauli Danielsen

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Ingvard Petersen, trúboðari í Venezuela. Sunnudagsskúlin er í summarfrí.
www.hebron.fo

**Frelsunarherurin**
*Tórshavn*
Leygardag kl. 11 útimøti um viðrar.
Sunnudag kl. 11 møti, hjúnini Marita og Egin Henriksen tala.
Kl. 18 møti, Torbjørn og Steintór syngja. Marita og Egin tala.

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Hóskvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti v/ Hollands-teaminum.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Edith & Jarnhold.
Mánakvøldið kl. 20.00 bønarmøti
Veri hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Frá Ebenezer**
Leygardagin, kl. 14.00 Brúðarvígsla, Astrid Gerhardsdóttir Tróndheim úr Klaksvík og Ragnar Mouritsen úr Hoyvík
Leygardag, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudag, kl. 10.00 Breyðbróting. Sunnudagsskúlin í summarfrí, kl. 18.00 Evangeliskt møti
Øll eru vælkomin
Heimasíðan:
www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið**
*Tróndargøta*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl 18 evangeliskt møti, Theodor Petersen talar.
Týskvøldið kl. 20 bønarmøti.
www.gospel.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30: Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30: Familjumøti, har Jógvan Z. talar um evnið »Eg eri vegurin, sannleikin og lívið«.
Kl. 11.30: Samvera við drekka.
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 talar Símun Pætur á Torkilsheyggi. Barnaansing er undir møtinum.
Sunnudaginkl. 12.00: Sunnudagsskúlin.
www.livdin.fo

**Meinigheitshúsið**
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v. Teimum 4: Enok, Kristoffur, Tummas og Sverra.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Ragnar Háskor og missionskunning, aftaná kaffisteðgin er Summarskúlin fyri børn, kl. 22.00 Útimøti í Vaglinum.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður evangeliskt møti kl. 18.00.
Veri hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Vágar**
Miðvágur. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Dánial á Dul Jacobsen.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin verður møti kl. 18 við Thomas Juul Askham og Johannes og Fríðu Danielsen. Streingjakórið syngur.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00: Awake við Arna og Malmberg.
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti við Egil Toftegaard.
Vælkomin í Kelduna!
www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
*Saltangará*
Sunnudagin kl.10.30: Møti.

**Oyndarfjørður**
Heimamissiónin hevur útimøti leygarkvøldið kl. 20.00.

**Hellurnar**
Heimamissiónin hevur útimøti leygarkvøldið kl. 21.00.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl.22.00 opið hús.
Sunnudagin kl.14.00 sunnudagsskúli, kl.17.30 bønarløta, kl.18.00 møti við Petur Martin Glerfoss. Ungdómsmøti kl. 21.00. Øll hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Simonu og Maiken Bringsberg
Sunnudagin kl.13.30 sunnudagsskúli og kl.18.00 er møti
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**Frelsunarherurin, Vági**
Leygardagin kl. 20 útimøti í Fámjin um viðrar. Sunnudagin kl. 18 evangeliskt møti við Heidi, Siste Karinu og fleiri.

**Felagið Tórshavn**
**GONGUTÚRUR**
Sunnudagin 10. juli kl 10.30 verður skipað fyri gongutúri, gingið verður frá Moskursfjall til Snædalsmúla og Loðadal. Tungur túrur. Tilmelding er neyðug.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Frá 4.–26. juli er Tilhaldið opið kl. 10.00–17.00.***
***27. juli er stongt vegna fyrireiking av Ólavsøkuframsýningini.***
***Á Ólavsøku verður ein framsýning av barnamyndum frá 1920–1945.***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan**
**í meinigheitshúsinum**
**er í summarfrí frá 1. juli til 5. september 2005.** Tá verður spælistovan í Margarinfabrikkini.